# Fara at bora aftur á Camboleiðini við markið

**Oljuboring. Oljufelagið Hess, ein gamal kenningur frá føroyska landgrunninum, hevur gjørt av at bora enn ein avmarkingarbrunn á Cambokelduni, einans tríggjar kilometrar frá føroyska markinum**

Jan Müller

Um somu tíð sum norska Statoil fyrireikar at bora tann áttanda brunnin á føroyska landgrunninum møguliga longu komandi summar, so standa eisini áhugaverdar boriætlanir beint hinumegin markið fyri framman. Amerikanska oljufelagið Amerada Hess, sum í 2002 gjørdi eitt fund á Cambo leiðini, einans tríggjar kilometrar frá føroyska markinum, hevur nú gjørt av at venda aftur til Cambokelduna og bora ein avmarkingarbrunn í mars mánað. Hetta verður gjørt fyri at vita, um Cambo er nóg stórt til at byggja út til framleiðslu. Frammanundan eru boraðir tríggir brunnar á hesi oljukelduni. Tað er greitt, at Cambokeldan eisini hevur stóran týdning fyri framtíðar leiting á føroyska landgrunninum, nú hon er tann oljukeldan vestan fyri Hetland, sum liggur tættast upp at føroyska markinum.

Oljublaðið Uppstream skrivar, at boringin, sum byrjar 26. mars og er mett at taka 120 dagar, er tann fjórði brunnurin, sum verður boraður á Camboøkinum. Tað verður boriskipið Stena Carron, sum fer at bora brunnin. Hóast Hess er fyristøðufelag, so verður tað Chevron, sum fer at standa fyri boringini. Felagið er eitt tað mest virkna vestan fyri Hetland, tá tað ræður um at finna nýggjar oljuleiðir. Í løtuni stendur felagið fyri eini boring á Lagavullinleiðini, ið liggur meira norðaliga. Stórur áhugi er um úrslitið av hesum brunninum, har eisini Faroe Petroleum er við. Stena Carron borar á hesi leiðini og fer víðari til Cambo, tá henda boring er liðug. Enn er einki komið fram um hesa boringina, ið sum skilst hevur verið ómetaliga kostnaðarmikil eitt nú vegna royndir hjá Greenpeace at steðga boringini.

Umframt Hess og Chevron, sum eiga 32,5% hvør í Cambo, eru eisini Dong við 20% og OMV við 10% við í Cambokelduni, sum liggur longur syðri og tætt við Rosebankfundið, sum Chevron umhugsar at byggja út. Um hesin fjórði brunnurin á Camboleiðini hevur við sær, at avgerð verður tikin um at útbyggja fundið, so verður tað framleiðandi oljukeldan, sum liggur næst føroyska markinum. Fyrstu ferð borað varð á leiðini var í 2002. Í 2004 og 2009 vórðu boraðir avmarkingar- og metingarbrunnar. Nú farið verður aftur at bora verður mett, at oljufeløgini eru nærri eini avgerð at byggja út fundið. Fyri Føroyar er tað altíð áhugavert, tá oljufeløg bora so nær markið, og verða útbyggingar gjørdar skamt frá markinum, so vilja slíkar eisini kunna fáa stóran týdning fyri framtíðar útbyggingar á føroyska landgrunninum. Verða fund gjørd á landgrunninum, sum ikki einsamøll kunnu bera eina útbygging, so vilja framleiðandi oljufelt í grannalagnum vera hent fyri eina føroyska útbygging, tí man tá hevur møguleikan at binda í infrastrukturin hinumegin markið, og harvið gera eina útbygging bíligari.




*Cambooljukeldan, ið varð funnin fyri skjótt 10 árum síðani, er tað oljufundið, sum liggur næst føroyska markinum, einans tríggjar kilometrar eystanfyri. Onkur vil vera við, at hon gongur inn á føroyskt øki. Oljufeløgini Hess og Chevron halda fundið vera so mikið áhugavert, at tey hava gjørt av at bora fjórða brunnin á leiðini. Verður úrslitið positivt kann tað hava við sær eina úbygging, og tá verður Cambo tann framleiðandi oljukeldan, sum liggur næst føroyska landgrunninum. Tað er tí greitt, at føroyskir myndugleikar fylgja sera væl við, hvat hendir á Camboleiðini.*

## B71-hópurin tekur skap

Áðrenn jól gjørdi B71 sáttmála við málmannin Símun Røgva Hansen og nakrar vikur seinni varð kunngjørt, at Piotr Krakowski skuldi verða venjara hjá 1. liðnum í 2011. Umframt hetta kunngjørdi felagið, at Høgni Midjord, Allan Tungá, Tummas Clementsen og Finn Erik Thomsen høvdu valt at halda fram í felagnum. Harafturat vóru Hanus Hentze, Gunnar Lydersen og Markus Clementsen tengdir at hópinum.

Fyri fáum døgum síðani gjørdi B71 sáttmálar við nakrar heimligar leikarar afturat. Fryntligi miðvallaleikarin Bogi Hermansen, sum seinasta ár kom til felagið frá FC Hoyvík, verður aftur at síggja á Sandoynni komandi kappingarár, eins og Ebbe Kristinn Thomsen og Rúni Joensen hava meldað seg klárar at tørna út fyri barndómsfelagið í summar. Harafturat verða René Clementsen og Bjørgfinnur Winther tengdir at hópinum.

- Ivaleyst er hetta gleðilig tíðindi fyri teir mongu dyggu stuðlarnar, ið hava bíðað eftir einum útspæli, skrivar B71 á heimasíðu sínari.

Dentur verður lagdur á, at alt er tó ikki fingið upp á pláss, men hetta má sigast at verða eitt stórt stig á vegnum.

*(kelda: b71-sandoy.com)*

## Í MORGIN




6-11 m/s    5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

## FRÍGGJADAGIN




11-16 m/s    9-14 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og um middagsleitið regn. Seinnapartin sama vindferð av vestri og sólglottar, men eisini ælingur, partvis kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.

## LEYGARDAGIN




8-13 m/s    5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av vestri, seinnapartin meiri vindur av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind millum útsynning og útnyrðing og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 3 og 7 stig

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1031 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing og viknar. Ein hitabrúgv vestan fyri Føroyar fer eystureftir.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið í útsynning úr Føroyum fer spakuliga eystureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 133 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -5 | **Tromsø** | -- | **Moskva** | 0 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 2 | **Bergen** | 0 | **Berlin** | 5 | **Beijing** | 0 |
| **Tórshavn** | 4 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 13 | **New Dehli** | 19 |
| **Lerwick** | 3 | **Stokkhólm** | -4 | **Madrid** | 8 | **Bangkok** | 31 |
| **Aberdeen** | 4 | **Keypmannah.** | 0 | **Róm** | 13 | **Sydney** | -- |
| **London** | 13 | **Helsinki** | -6 | **Malorca** | 16 | **New York** | 0 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

22. jan. Mánin næstur jørðini
26. jan. Seinna kvarter
6. feb. Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. jan. | 11:44 | - | 10:44 | 23:24 | 10:59 | 23:39 | 01:17 | 13:44 | 02:17 | 14:44 | 09:59 | 22:39 | 08:59 | 21:39 | 11:59 | - | 00:32 | 12:59 | 11:29 | - | 00:17 | 12:44 |
| 27. jan. | 00:24 | 13:04 | - | 12:04 | - | 12:19 | 02:24 | 15:04 | 03:24 | 16:04 | 11:19 | 23:59 | 10:19 | 22:59 | 00:39 | 13:19 | 01:39 | 14:19 | 00:09 | 12:49 | 01:24 | 14:04 |
| 28. jan. | 01:44 | 14:25 | 00:44 | 13:25 | 00:59 | 13:40 | 03:44 | 16:25 | 04:44 | 17:25 | - | 12:40 | 11:40 | - | 01:59 | 14:40 | 02:59 | 15:40 | 01:29 | 14:10 | 02:44 | 15:25 |
| 29. jan. | 03:05 | 15:19 | 02:05 | 14:19 | 02:20 | 14:34 | 05:05 | 17:19 | 06:05 | 18:19 | 01:20 | 13:34 | 00:20 | 12:34 | 03:20 | 15:34 | 04:20 | 16:34 | 02:50 | 15:04 | 04:05 | 16:19 |
| 30. jan. | 03:46 | 16:12 | 02:46 | 15:12 | 03:01 | 15:27 | 05:46 | 18:12 | 06:46 | 19:12 | 02:01 | 14:27 | 01:01 | 13:27 | 04:01 | 16:27 | 05:01 | 17:27 | 03:31 | 15:57 | 04:46 | 17:12 |